# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

# Gylti ringur Íslands

Við 3000 árum á baki er Kerið, sum liggur við urtagarðsbýin, Hveragerði, nógv tann yngsta vulkanin í økinum. Flestu av hinum eru á leið dupult so gamlar



**Tann mest vælumtókta ferðamannrutan í Íslandi, er uttan iva sokallaði Golden Circle, har túrurin byrjar í Reykjavík og kós verður sett móti Tingvellir. Haðani víðari móti Laugardagsvatni, Geysir, Gullfoss, Kerið, Bláa Lóni og Bessastøðum, áðrenn kósin aftur verður sett móti høvuðsstaðnum**

Íslendingar eru sera stoltir av rutuni Golden Circle, sum er ein vælumtókt ruta hjá ferðafólki, ið vitja Ísland. Ongin ivi er um, at Reykjavík liggur í einum áhugaverdum øki, tí her liggja flest áhugaverd ella atkomilig støð í øllum landinum, tá ræður um ferðavinnu.

Tingvellir, sum er tað fyrsta steðgið á vegnum, er elsti tingstaður í heiminum frá ár 930. Her er frálíka gott útsýni yvir Tingvallavatn, sum letur vatn til tað stóra orkuverkið við Nesjavellir, ið hitar vatnið upp og leiðir tað víðari til Reykjavíkar.

Framvið og rundan um vatnið liggur ein sera long gjógv, ið hevur brotið nógvar kilometrar av landslagi sundur. Ein stórur hylur beint við vatnið hevur fingið navnið drukningahylur, tí hann í gomlum døgum varð nýttur til at drukna kvinnur, sum høvdu fingið børn uttan um hjúnarlag ella vóru ólýdnar móti manninum. Eisini tær kvinnur, ið vóru stempladar sum heksir, vórðu bundnar og tveittar í hylin, har tær druknaðu.

Í 1930 var økið við Tingvellir friðað og lýst sum fyrsta náttúrupark í Íslandi. Bert fá hús eru her. Millum annað ein lítil trækirkja og eitt gavlhús, sum parvíst verður nýtt sum alment summarhús hjá forsætisráðharraranum, umframt ein matstova.

Tingvellir hevur oftani verið ramman um týdningarmiklar hendingar, sum hava við sjálva íslendsku tjóðina at gera. Tá Ísland varð útnevnd sjálvstøðug tjóð í 1944 fór hetta fram í oysandi áarføri við Tingvellir, har 30.000 íslendingar luttóku. Regnið varð umrøtt sum himmalsins gleðistár. Í 1994 luttóku næstan tvífalt so nógv fólk í 50 ára føðingardegnum hjá íslendsku tjóðini.

## Goyst í 700 ár

Av Tingvellum gongur leiðin víðari móti Geysir umvegis Laugardagsvatn, ið er vælumtókt feriustað millum íslendingar. Her liggja ein ørgrynna av summarhúsum.

Geysir, sum liggur í tí kenda Haukardalinum, hevur eftir øllum at døma goyst líka síðani 1300 talið, men hevur ikki latið við seg koma í nógv harrans ár, hóast vatnið í holinum smákókar. Og tó; burtursæð frá einum tíðarskeiði í 2000, tá jarðskjálvti var í økinum, kom aftur lív í Geysir. Síðani tá hevur bert tann minni geysir beint viðsíðuna av, ið kallast Strokkur, goyst. Hvønn fimta minutt sprænir Strokkur kókandi heitt vatn 25-30 metrar upp í loft. Øll undirgrundin uttanum kókar eisini. Hetta sæst ígjøgnum smærri hol ella rivur í undirgrundini.

Frá Geysir er skjótt at koyra til Gullfoss. Kendi og stórsligni fossurin, hvørs vatn úr ánni Hvítá fyri tað mesta er smeltivatn frá Langajøkli.

Tá sólin skýnur standa vakrir ælabogar yvir fossin, sum skjýtur seg góðar 30 metrar niður og síðani rennur víðari niður í eina 70 metrar djúpa og 2,5 kilometrar langa gjógv.

Eisini um veturin kann Gullfoss verða verdur eina vitjan. Serstakliga um kuldi hevur ligið í longri tíð, tí her kann gerast ógvuliga kalt, og tá veksur ísur framvið og út yvir rennandi vatnið, ið ger fossin ómetaliga vakran.

Frá Gullfossi gongur leiðin í ein útsynning móti vakstrarhúsbýnum Hveragerði. Á vegnum bert til at steðga við Kerið, sum er ein 3000 ára gomul vulkan. Vatn er í gosopinum, og fiskur er í. Helst tí onkur hevur sett út.

Við Kerið sæst yvir á Hveragerð, sum er fremsti grøni býur í Íslandi við stórum vakstrarhúsum, har tey millum annað dyrka agurkir, tomatir, grønt pipar, blómur og enntá bananir. Orkan kemur sjálvandi frá ókeypis hitanum í undirgrundini.

Síðani Bláa Lónið, ella Blue Lagoon, ið liggur við eitt orkuverk millum Keflavík og Grindavík, kom fyri nøkrum árum síðani, er tað eisini vorðin ein partur av Golden Circle-rutuni. Tekur man tað við, fer ein heilur dagur til rutuna. Annars ber til at leggja hesa vitjanina ein annan dag og geva sær góða tíð til hini støðini, ið kunnu klárast upp á einar fimm-sjey tímar.

Alt eftir, hvussu leingi steðgað verður tey ymsu støðini. Hevur man nakrar dagar í Íslandi, er hesin túrurin eitt »must«. Eisini er vert at vitja Bessastaðir uttanfyri Hafnarfjørð beint sunnanfyri Reykjavík, har forsetasætið hjá íslendingum liggur.

### Puntur nr. 2



